## DAGSINS MEINING

# Lívsneyðug ráðstevna

Í gjár var ráðstevnan ”Lívsneyðug ráðstevna - RFF 30 ár” í Norðurlandahúsinum, har fyrilestrahaldarar úr bæði Føroyum, Danmark og Svøríki luttaka. Tað eru sostatt trýati ár, síðan Ráðið Fyri Ferðslutrygd varð stovnað. Ferðslutrygdin er eitt hitt størsta vandamálið í nútímanssamfelagnum. Hóast ráðið hesi farnu trýati árini hevur gjørt eitt gott arbeiði, so er støðan ikki nøktandi. Tað henda alt ov nógvar vanlukkur, og eigur tí alt at verða gjørt til tess at fáa vanlukkurnar at minka í tali. Ferðsluvanlukkurnar kosta liv og limir. Tær elva til ófatiligar sorgarleikir. Vanlukkurnar gera ómetaligan skaða á likam og sál umframt, at tær kosta samfelagnum stórar upphæddir. Her má nakað munagott gerast, tó eingin hugsar sær, at hetta er ein løtt uppgáva. Ráðstevnan er tann fyrsta í Føroyum av sínum slagi og fyrireikararnir hava veruliga lagt seg eftir at gera ráðstevnuna so viðkomandi og fjølbroytta sum møguligt. Hetta er eydnast teimum til fulnar. Tað varð staðfest á ráðstevnuni, at vit hava vit onga politiska endamálsorðing á ferðslutrygdarøkinum, og tískil hava vit heldur onga politiska virkisætlan fyri ferðslutrygdini í Føroyum. Hetta er spell, og her má vend koma í. Hinvegin hava vit framvegis ”Null hugsjónina”, sum allir avvarandi partar eiga at halda rimmarfast um, hóast tað í løtuni sær svart út fyri hesari sera góðu hugsjón. Vit ivast ikki í, at høvdu vit ikki havt hesa visión, so var støðan viðvíkjandi ferðslutrygdini uppaftur verri. Tað ræður um ikki at missa móti, men at seta neyðug tilttøk í verk til tess at økja um rygdina. Tað er ikki bara her og í grannalondum okkara at miðað verður ímóti Nullhugsjónini. Við slagorðunum, ”Ferðslutrygd er Null vanlukkur”, var ferðslutrygdin evnið á alheims heilsudegnum hjá WHO í 2004 Alt hetta merkir, at vit nú mugu hava ein ferðslutrygdarpolitikk. Hesin politikkur eigur at fevna um mál, mið og strategi. Poltikkur skal sostatt fevna um yvirskipað viðurskifti eins væl og heilt ítøkilig tiltøk. Hesi tiltøk eiga at fevna um alt frá betri koyrifrálæru og størri krøv til bilførarar og betri vegir, herundir broytingar í vegakervinum fyri at gera hetta tryggari. Eisini má setast inn longu í dagstovnum og í fólkaskúla við ferðslufrálæru.

Til summars verður Norðoyatunnilin latin upp. Hetta annars frálika framstig hevur eina nógv økta ferðslu sum fylgju. Her er neyðugt við tiltøkum, sum ikki kunnu bíða eftir einum yvirskipaðum ferðslupolitiki. Vit hugsa um Lorvík, um strekkið millum Skipanes og Skálabotn, innkoyringina til Tórshavn o.m.a.

Á ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum vóru fleiri fyrilestrar av bæði føroyskum og norðurlendskum fyrilestrahaldarum, eins og filmsklipp og kjakpanel. Í fyrilestri sínum á ráðstevnuna um ferðslutrygd í Norðurlandahúsinum, hevði Thomas Carlson, fjølmiðlaleiðari hjá NTF í Svøríki, nakrar viðmerkingar til føroyska vegakervið. Í fyrilestrinum kom hann eisini inn á føroyska vegakervið. Thomas Carlson hevur, sum nevnt í tíðindunum frá stevnuni, nú í nakrar dagar koyrt kring landið og hugt eftir vegakervinum í Føroyum. Hann staðfestir, at vit hava alt ov lítið av autoverju á høvuðsvegnum. Serliga har vandi er fyri at bilurin rennur inn í bergið oman fyri, har mangla vit autoverjur, eisini nógvastaðni er eingin vegøksl og eingin autoverja. Um ein bilur fer út av vegnum, er stórur vandi fyri, at hann t.d. endar á sjónum. Eisini heldur heldur hann, at við vegamótini á landsvegnum, har tveir síðuvegir koma inn á landsvegin, eigur ferðin at verða sett niður frá 80 km/t til 50 km/t. Myndugleikarnir eiga alt fyri eitt, at taka atfinningar Carlsons til eftirtektar. Tey viðurskifti, ið Carlson vísir á kunnu heldur ikki bíða eftir einum yvirskipaðum ferðslutrygdarpolitikki. Avvarandi myndugleikar eiga at fara til verka beinanvegin. Sosialurin vil at enda staðfesta, at RFF hevur verið til mikið gagn hesi 30 árini og ynskið skal verða, at RFF skal fer at hava hepna hond við virkseminum í framtíðini.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Bluffið um serrættindi teirra samkyndu

**HEINI Í SKORINI**
Lesandi



**Framvegis er umstrídda málið um støðu teirra samkyndu eyðkent av misskiljingum og ósvaraðum spurningum, heldur Heini í Skorini**

------ ------- -----

Størsta misskiljingin tykist vera æviga endurtøkan um »serrættindi« og »serlóggávu« til tey samkyndu, sum nei-síðan tekur upp aftur og aftur. Tað verður lagt fram sum um, at samkynd nú skulu takast fram um allar aðrar samfelagsbólkar, og um tú endurtekur eina lygn nóg ofta, gerst hon til seinast sannleiki.

Fá tykjast skilja, at eginleikarnir í anti-diskriminatiónsparagraffini, sum ikki er loyvt at diskriminera vegna, eru universellir, tað vil siga umfata øll. ØLL hava eina rasu. ØLL hava ein húðarlit. ØLL hava ein nationalan uppruna. ØLL hava ein etniskan uppruna. Og ØLL hava eina trúgv (um vit definera trúgv í breiðastu merking). Og eins og við øllum hinum eginleikunum hava ØLL eisini eina seksuella orientering. Við øðrum orðum fær øll mannaættin innivist í hesi paragraff, hóast hon sjálvsagt er ætlað serliga trýstum og hóttum minnilutum.

**Bill villeiddi**

Bill Justinussen, løgtingsmaður Miðfloksins, nýtti í Kjakinum í SvF herfyri júst hesa grundgeving at vísa á, at rasa, húðarlitur, nationalitetur, etniskur uppruni og trúgv eiga at standa í paragraffini. Men í staðin fyri at halda fram og taka fullan konsekvens av síni grundgeving, slapp hann (uttan átalu frá vertinum) fyri opnum skermi at billa Føroya fólki inn, at av tí at allir føroyingar ikki eru samkyndir, skal paragraffin ikki víðkast. Nei Bill, víst eru allir føroyingar ikki samkyndir, men allir føroyingar hava eina seksuella orientering, og tað er tað, sum uppskotið hjá teimum báðum tjóðveldistinglimunum snúði seg um.

Tí byggir broytingaruppskotið hjá Finni og Annitu á júst sama logikk sum restin av paragraffini. Allir íbúgvar í Føroyum eru heldur ikki svartir, jøðar, eystureuropearar ella pinsar, men tað merkir ikki, at vit vilja strika teirra minnilutaverju. Um seksuell orientering ikki fær innivist í paragraffini, tí allir føroyingar ikki eru samkyndir, hví skulu vit so halda fast við hinar eginleikarnar, sum í dag eru nevndir?

**Mismunur**

Teir mongu játtandi trúgvandi føroyingarnir eru í dag tryggjaðir í paragraffini móti diskriminering vegna trúgv, og tað er at fegnast um. Men tað er hugstoytt, at fleiri av hesum somu ikki unna sínum medmenniskjum somu verju, sum tey sjálvi hava møguleikan at gera sær dælt av, um tey kenna seg illa viðfarnan. Og siga útsagnir varafútans ikki alt? Um hvalvíksprestur hevði skrivað slíkt um tilflytarar, myrk ella baptistar, hevði hann helst havt eitt rættarmál við støði í revsilógini. Men tá tað eru tey samkyndu, sum standa fyri skotum, er einki at fara eftir. Tað er við øðrum orðum revsivert at hótta, háða og niðurgera summar minnilutabólkar, men ikki allar. Vit kunnu ikki draga aðra niðurstøðu enn, at her er talan um grovan mannamun og mismun, uttan mun til, um vit taka undir við samkyndum livihátti ella ikki.

**Inkluderandi demokrati**

Vit kunnu bert konstatera, at týdningarmikla politiska stríðið fyri tí góða lívinum og tí felags besta er reduserað til stríðið fyri mínum góða lívi og mínum egna besta. Okkara demokrati tykist bert vera galdandi fyri summi, og harvið hava vit gjørt upp við idealið um, at eitt demokrati per definitión er inkluderandi, tað vil siga umfata øll. Politikkur er djúpast sæð ikki annað enn tann gongd, har vit læra at liva við ymiskleikunum hjá hvørjum øðrum. Og konstruktivur politikkur eigur ongantíð at snúgva seg um vald, men um valdsins avmarkingar. Tað tykist bert ikki vera veruleikin í Føroyum í dag.

*heini_skorini@yahoo.com*

# Fuglakrím kann senda Jón Róa og Súna til Spania

**Túrurin til Turkalands hjá føroysku landsliðsleikarunum og hinum í superliga felagnum AaB verður nú kanska av ongum orsakað av vandanum fyri fuglakrími**

**FÓTBÓLTUR**
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Felagið hjá Jón Róa Jacobsen og Súna Olsen, AaB skal eftir ætlan í venjingarlegu í Turkalandi 29. januar. Men nú fólk er farin at doyggja av fuglakrími har, er AaB leiðslan farin at umhugsa støðuna, skrivar danska Ekstra Bladet.

Ítróttarstjórin í AaB Lynge Jacobsen sigur við blaðið, at hetta er ein støða, ið AaB tekur við størsta álvara. Ferðavinnustovan, ið skipar fyri túrinum, hevur longu gjørt eina neyðloysn í Cardiz í Spania klára, um ferðin til Turkaland verður avlýst.

Lynge Jacobsen viðgongur, at hann einki veit um fuglakrím, men at hann er greiður yvir, at tú ikki eigur at hoppa í einum hønsnagarði, hetta væntar hann nú heldur ikki at leikarararnir fara. Men læknin hjá felagnum hevur samband við turkisku heilsumyndugleikarnar, og metir alla tíðina um støðuna. Lynge Jacobsen sigur, at í tílíkum førum er annað í er týdningarmiklari enn fótbóltur, og um støðan knappiliga gerst verri, so verður neyðloysnin nýtt.

Eisini OB og FC Midtjylland skulu til Turkaland í venjingarlegu. OB hevur eins og AaB eina neyðloysn klára, meðan FC Midtjylland ikki metur støðuna vera so vandamikla, PR stjórin hjá FCM sigur við Ekstra Bladet, at um tú ikki nemur við fugl ella etur hálvrátt kjøt, so er eingin vandi. So tey hava ongar ætlanir um at halda eina hønsnarunga barbecue.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.